# Verða sjúkar av at arbeiða á Landssjúkrahúsinum

**Sjúkrasystrar á Landssjúkrahúsinum hava so nógvar sjúkradagar, at tað má vera á fáum arbeiðsplássum, at støðan er so ring**

LANDSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*



*Sjúkrasystrar á B 6 á Landssjúkrahúsinum eruso ofta sjúkar, at tað man vera á fáum arbeiðsplássum, at støðan er verri*

Tað er hart lív at arbeiða á Landssjúkrahúsinum.

Tað kunnu sjúkrasystrarnar skriva undir upp á.

Á B 6, sum er ein heiliráðsdeild á Landssjúkrahúsinum, hava 19 av teimum 23 sjúkrasystrunum følt arbeiðstrýstið so hart, at tær hava nú gjørt av at siga upp. Eftir á deildini verða sostatt bara fýra sjúkrasystrar og tveir sjúkrahjálparar.

Ingun Gaardbo, álitisfólk hjá sjúkrasystrunum á B 6, sigur, at tað er so tungt at arbeiða á deildini, at sjúkrasystrarnar rætt og slætt verða sjúkar av tí.

Tað er vanlig fatan, at eitt eyðkenni um vánaligar umstøður á einum arbeiðsplássi, er, at starvsfólkið er nógv burtur vegna sjúku.

Er tað rætt, stendur rættiliga illa til á B 6, tí har tað munnu vera fá arbeiðspláss í landinum, har starvsfólkið er so illa sjúkt.

– Í fjør vóru sjúkrasystrarnar á B 6 sjúkar í 23 dagar í miðal. Tvs, at hvør sjúkrasystir var sjúk í yvir tríggjar vikur í miðal.

Tilsamans høvdu tær 23 sjúkrasystrarnar 545 sjúkradagar.

Álitisfólkið minnist, at í 1997 høvdu tær á B 6 yvir 380 sjúkradagar tilsamans og tað var hildið at vera óhoyrt nógv. Í fjør vóru teir so yvir hálvtannað hundrað fleiri.

Hon sigur, at tað er ógvuliga ójavnt, hvussu sjúkradagarnir eru býttir ímillum sjúkrasystrarnar á deildini.

– Summar eru ikki ofta sjúkar og aðrar eru rættiliga nógv burtur vegna sjúku.

Hon heldur, at teir nógvu sjúkradagarnar eru eitt víst tekin um, at arbeiðsumstøðurnar eru so vánaligar.

– Nógvar av sjúkradøgunum eru tí at ryggurin á sjúkrasystrunum gongur fyri av tí at arbeiðið er so tungt.

Eisini í gjár stóð rættiliga illa til á B 6. Tær skuldu vera átta til arbeiðis, men vóru bara fýra, so tær høvdu úr at gera.

## Ikki frið at halda frí

Ingun Gaardbo sigur, at tað, sum tey hava brúk fyri á B 6, er rætt og slætt at tær fáa fleiri fólk.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur bjóðað teimum á skeið, men tað hava tær tikið rættiliga illa upp.

– Tað einasta, hetta vísir, er, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur brúk fyri at fara á skeið. Vit hava ikki brúk fyri skeiði, tí tað eru ikki samstarvstrupulleikar, ella annað, sum eitt skeið kann loysa, sum er trupulleikin. Tað einasta, sum er trupulleikin, er, at vit eru ov fá starvsfólk.

– Avleiðingin av, at vit eru so fá, er m.a. at vit fáa aldrin frið, tí tá ið vit annars hava frí, er tað næstan altíð boð eftir okkum, tí trot er á fólki. Av tí sama er yvirtíðin alt ov nógv.

Tey siga, at hevði B 6 fingið 3,6 sjúkrasystrar afturat, hevði tað staðið væl til.

– Men vit hvørki krevja ella vænta, at fáa øll í senn. Høvdu vit fingið eitt, ella tvey fólk afturat beinanvegin og lyfti um at fáa restina seinni, og at amboð og útgerð verða skift út, tí alt er so niðurslitið, hevði tað helst fingið okkum at tikið uppsagnirnar aftur.

Alitisfólkið á B 6 sigur, at so leingi, sum leiðslan á landssjúkrahúsinum ikki gongur teimum á møti, standa uppsagnirnar við. Og í gjáramorgunin høvdu tey onki hoyrt frá leiðsluni.

– Hetta er ikki ein nýggjur trupulleikar. Vit hava verið undirmannað í fleiri ár og nú eru vit so útkoyrdar, at tað var ongin vegur aftur, uttan at taka tað álvarsliga stigið at siga upp, sigur Ingun Gaardbo.

# Vit skilja tær væl

**Sjúkrasystrarnar á Landssjúkrahúsinum skilja væl, ta støðu, sum sjúkrasystrarnar á B 6 eru komnar í**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*



*Á øðrum deildum á Landssjúkrahúsinum skilja tær fullvæl støðuna, sum tær á B 6 eru komnar í*

Sjúkrasystrarnar á B 6 á Landssjúkrahúsinum eru ikki einsamallar. Av øðrum deildum á Landssjúkrahúsinum verður sagt, at tær skilja væl støðuna, sum tær á B 6 eru komnar í.

Tað skilst, at tað er trot á sjúkrasystrum víða hvar á Landsjúkrahúsinum.

Á B 7 sigur álitisfólkið, Leila Danielsen, at arbeiðsumstøðurnar eru vánaligar og at tey eisini hava søkt um fleiri fólk á teirra deild. Fólk verða eldri og eldri og tí eru tey mangan ógvuliga røktarkrevjandi, tá ið tey koma á sjúkrahús. Nogv fólk, sum av røttum áttu at verið á røktarheimi, ella øðrum stovnum, enda eisini á sjúkrahúsinum.

Á B 4, sum er barnadeildin, er støðan eisini vánalig, tó at arbeiðstrýstið ikki er so javnt stórt, sum á øðrum deildum.

– Tað veldst um, hvussu nógv børn eru innløgd. Viðhvørt, tá ið umfarssjúkur av ymsum slagi ganga, liggja nógv børn á barnadeildini og tá er úr at gera, sigur Aurora Weihe, sum er álitisfólk har.

Eisini á barnadeildini hava tey søkt um fleiri fleiri fólk.

Hon viðgongur eisini, at framstig henda, men tað gongur ógvuliga seint og enn er brúk fyri fleiri fólkum.

– Vit hava nóg mikið at gera. Men tað er ikki so galið, at vit hava hug at siga upp, ikki enn í hvuss so er. Hon sigur, at hon skilir støðuna hjá teimum á B 6 fullvæl.

– Har er spart og spart í kreppuni og tað tykist ikki sum um tað kemur í rættlag aftur. Tær hava arbeitt í nógv ár við ov fáum fólkum undir eini arbeiðsbyrðu, sum er javnt stór.

– Tað verður sagt, at tað hevur hjálpt upp á støðuna at seingjatalið á deildini er lækkað, men hetta er mest á pappírinum, tí ofta er gangurin eisini fullur av sjúklingum, sigur Aurora Veihe.



Ítróttarhøllin á Eiði:

# Dupult so dýr sum ætlað

**Undan seinasta bygdaráðsvali á Eiði varð uppskot lagt fram um bygging av ítróttar-og skúlahøll afturat skúlanum á Eiði. Kostnaðarmetingin lá beint niðanfyri 9 milliónur krónur. Uppskotið varð samtykt við 6 atkvøðum fyri og bert einari ímóti. Til dags dato eru brúktar góðar 15 milliónur krónur, og væntandi verða eini fýra milliónir brúktar afturat, áðrenn ítróttarhøllin er liðugt bygd**

BYGGING
*Ingrid Bjarnastein*



*Høllin á Eiði verður allarhelst meira enn dupult so dýr sum upprunaliga mett.*

Íløguloftið hjá Eiðis Kommunu er 2,5 milliónur krónur. Hetta sigur so mikið sum tað, at kommunan hevur seinastu tvey árini sprongt íløguloftið við yvir 10 milliónum krónum. Á Kommunala Eftirlitinum eru tey varug við trupulleikan, men onki verið gjørt við hann fyribils.

– Grundin til, at vit ikki hava megnað at hildið okkum innafyri íløgukarmin er, at skúlans partur skuldi verða liðugur aftaná summarfrítíðina í ár, sigur Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði.

Høllin var mett at koma at kosta nærum 9 milliónir krónur. Í dag eru brúktar góðar 15 milliónir krónur, og verða umleið fýra milliónir krónur brúktar afturat. Tað ger, at tá høllin er liðug, hevur hon kostað meira enn 100% afturat upprunakostnaðarmetingini.

– Um vit høvdu skula hildið karmin, so hevði høllin tikið eini 10 ár at byggja. Kostnaðarmetingin, sum varð framd av einum av bygdaráðslimunum, hevur verið alt ov vánalig. Ov lítið forarbeiðið hevur verið gjørt. Ein kann næstan siga, at talið, sum varð lagt fram var eitt fiktivt tal, sigur Tordur Niclasen.

## Ikki afturvaldur

Hans Jákup í Kollsbyrgi var fyrrverandi bygdaráðsformaður á Eiði. Hann var sum tann einasti ímóti byggingini av høllini á Eiði, og varð hann ikki afturvaldur til kommunuvalið í 2000.

– Eg var ikki ímóti sjálvari høllini, men eg helt tað vera skilabetri at byggja høllina á til dømis Oyrabakka saman við hinum kommununum í Norðurstreymoy og Norðureysturoy, so vit øll kundu brúka høllina í felag, sigur Hans Jákup í Kollsbyrgi.

Tá nýggja skúlalógin kom í gildi, varð staðfest, at skúlin á Eiði nøktaði ikki plássið, sum var kravt. Tí skuldi byggjast uppí skúlan. Fyrsta uppskotið til at byggja uppí skúlan varð ikki góðkent av landsarkitektinum ella Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Tí samráddist Hans Jákup við ein nýklaktan byggifrøðing, og fekk hana at gera eitt uppskot til uppíbygging av skúlanum. Hetta uppskotið varð góðkent, men stutt eftir legði ein av bygdaráðslimunum uppskot fram um at byggja ítróttar- og skúlahøll – alt í senn.

Kostnaðarmetingin av uppíbygging til skúlan lá um 8 milliónir krónur og upprunametingin til ítróttarhøllina og skúlahøllina var 16. desember 1999 8,95 milliónir krónur. Á borgarafundi á Eiði segði Hans Jákup, sum sjálvur er byggifrøðingur, at henda verkætlan fór at kosta í minsta lagi 13 milliónir.

Uppskotið til bygging av ítróttar- og skúlahøll varð tó samtykt við eini kostnaðarmeting, sum nú hevur víst seg at vera langt við síðuna av veruliga kostnaðinum.

– Á Eiði búgva 700 fólk, og tí haldi eg ikki, at grundarlag er fyri at byggja slíka høll bert til eiðisfólk, greiðir Hans Jákup frá.

– Tað er ikki nøkur eingangsútreiðsla at byggja eina høll. Høllin skal eisini rekast, og tað er mest um vikuskiftini, at høllin verður nýtt og noyðast tí minst tvey fólk at arbeiða í hesum sambandi, tí ongin tímur at arbeiða hvørt vikuskifti.

## Lata standa til

Á Kommunala Eftirlitinum eru tey varug við trupulleikan, men fyribils verður onki gjørt við at loysa hann.

– Vit hava fyri stuttum verið í samráðingum við kommunufeløgini um íløgukarmin fyri komandi ár, sigur Hilmar Høgenni á Kommunala Eftirlitinum.

– At Eiðis Kommuna hevur trupulleikar við íløgukarminum, er okkum væl greitt, men vit fáa ikki avgreitt hetta, fyrr enn ein avtala um íløgukarmin fyri komandi ár er gjørd. Tað er ikki fyrr enn íløgukarmurin fyri komandi ár er settur, at tosað verður um, hvat skal gerast við kommunur, sum hava sprongt íløgukarmin, og hvussu verður við teimum, sum ikki hava brúkt alt.

## Ov lítið fyrireikingararbeiði

Høllin á Eiði verður fíggjað yvir raksturin. Inntøkugrundarlagið er stak gott í løtuni og skattagrundarlagið nógv hægri enn væntað varð. Tordur Niclasen sigur, at Eiðis Kommuna er ein kommuna í blóma, og tí skulu fortreytir fyri at fáa fólk at trívast eisini vera har. Harundir kemur millum annað skúli, ítróttarhøll, dagrøkt, eldrasambýli og annað.

Men at upprunametingin av høllini skuldi verða so langt við síðuna av, hevði helst fáur droymt um.

– Ov lítið fyrireikingararbeiði hevur verið gjørt innan farið varð undir at byggja, greiðir Tordur frá.

– Høllin er vorðin nógv dýrari enn væntað varð, men vit hava fingið nógv fyri pengarnar. Handverkaarbeiðið er eitt dygdararbeiði, sum er ógvuliga væl úr hondum greitt.

Hans Jákup í Kollsbyrgi, fyrrverandi bygdaráðsformaður, heldur sjálvur, at um teir heldur vóru farnir undir at byggja høll í samráð við hinar kommunurnar í Norðurstreymoy og Norðureysturoy, so hevði Eiðis Kommuna heldur kunnað miðað ímóti at bygt ein barnagarð. Hesin barnagarður kundi allarhelst staðið nærum, um ikki heilt liðugt bygdur í dag.

Bæði Tordur Niclasen og Hans Jákup í Kollsbyrgi halda, at tað at árið var eitt valár kann hava havt okkurt at siga í hesum sambandi.

